## Ísland fær hjálp

Noreg og Ísland eru komin ásamt um ein sáttmála, sum ásetir, at Noreg skal koma Íslandi til hjálpar, um landið hevur tørv á at verja sítt yvirvaldsræði. Ísland hevur ein tilsvarandi sáttmála við Danmark frammanundan. Aftenposten skrivar, at eftir sáttmálanum fáa norsk eftirlits- og stríðsflogfør loyvi til at brúka flogvøllin í Keflavík. Morgunblaðið ger vart við, at tað eru framvegis USA og NATO, sum skulu verja Ísland ímóti álopi.

## Nógv ferðafólk

Hesin veturin hevur verið tann besti nakrantíð hjá teimum donsku ferðaskrivstovunum, sum liva av at senda fólk av landinum at ferðast. Næstan 400.000 danir hava verið uttanlands í vetur, og tað er 10 prosent fleiri enn seinasta vetur. Tað eru framvegis tær Kanarisku oyggjarnar, sum draga danir av landinum um veturin, men ferðamál sum Teiland og Egyptaland eru eisini væl umtókt. Serliga Teiland hevur verið væl umtókt í vetur.

# Artiscope selur okkara tónleik til danir

**Fyritøkan Artiscope hevur fingið ábyrgdina av at skipa fyri tónleikatiltøkunum á Norðuratlantsbryggjuni, tey, ið mynda fyritøkuna, hava áður verið við til at gera spælistaðið Vega til best umtókta spælistað í Keypmannahavn**



*Nicolaj Hyltén-Cavallius, stjóri og Jannick Blaksmark, samskiftisráðgevi ætla at fáa Norðuratlatsbryggjuna at lýsa upp í havnarlagnum í Keypmannahavn.*
*Mynd: Símun Jóanesarson*

TÓNLEIKUR
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Norðuratlants Bryggjan í Keypmannahavn er í eini roynd at røkka sínum máli um at gerast ein miðdepil í Danmark fyri mentan úr Útnorðri, farin undir samstarv við donsku tónleika- og samskiftisfyritøkuna Artiscope. Eftir triðja heila árið við tiltøkum, hevur Bryggjan gjørt av, at fáa uttanhýsis hjálp til fyriskipanina á tónleika økinum. Vit hava hitt teir báðar Nicolaj Hyltén-Cavallius, stjóra og Jannick Blaksmark, samskiftisráðgeva í Artiscope, og práta um uppgávuna at fyriskipa og selja føroysk, grønlendsk og íslendsk tónleikatiltøk í Danmark.

### Nýggj fyritøka

Í einum trongum men sera hugnaligum kjallarahølum á Christianshavn, eitt hanagleiv frá Norðuratlants Bryggjuni, heldur Artiscope til. Fýra fólk starvast í fyritøkuni, ið Nicolaj Hyltén-Cavallius nýliga hevur sett á stovn.

- Ja, hetta er ein nýggj fyritøka. Men vit hava øll nógvar royndir, sigur Nicolaj, meðan hann skeinkir okkum nýbryggjaða kaffi.

Nicolaj sjálvur kemur úr starvi sum kunningarstjóri á tónleikastaðnum Vega í Keypmannahavn. Hann hevur í fimm ár verið við til at gjørt Vega til eitt av best umtóktu spælistøðunum í Keypmannahavn fyri ikki at siga í Norðurlondum. Tá hann fór úr starvinum í Vega, tók hann hini 3, ið starvast hjá Artiscope, við sær. Tey hava sostatt øll royndir úr Vega.

### Vildi tættari tónleikarin

- Eg fór úr starvinum í Vega, tí at eg fegin vildi arbeiða tættari tónleikaranum, greiður Nicolaj frá og heldur fram:

- Tað ljóðar kanska burturvið, at eg sum arbeiddi á einum spælistað, vildi tættari at tónleikaranum. Men tað, sum eg meini er, at eg vildi arbeiða í samstarvi við tónleikarar á fleiri ymiskum økjum. Artiscope er t.d. eisini eitt plátufelag. Vit umboða fólk og taka okkum av bókingum fyri festivalar og tílík støð sum Norðuratlants Bryggjuna.

### Netverk eru rætta leiðin

Nicolaj metur, at fyritøkan er væl brynja til avbjóðingina at gera Norðuratlantsbryggjuna til ein miðdepil fyri tónleik úr Útnorðri. Hetta hóast hvørki Nicolaj, Jannick ella nakar annar í fyritøkuni hevði nakran kunnleika til tónleik úr Útnorðri, tá samstarvið kom í lag.

- Okkara fakliga støði brynjar okkum væl til avbjóðingina, vit hava væl útbúgvið fólk við góðum royndum og kunnleika til marknaðin í Keypmannahavn. Vit duga at skapa netverk, so hóast tónleikur úr Føroyum, Íslandi og Grønlandi er eitt nýtt øki fyri okkum, so hava vit longu skapt eitt sterkt netverk við eitt nú plátufeløg og onnur innan fyri tónleikavinnuna í hesum londunum. Tann kunnleikin, ið vit ikki havam kunnu vit fáa gjøgnum hesar samstarvsfelagar, greiður Nicolaj frá.

### Minifestivalar

Higartil hevur Artiscope skipað fyri tveimum tiltøkum á Norðurbryggjuni hip hop festivalinum Svartakálk og singer/songwriter festivalinum Ljómandi Kuldabrúgv. Tvey tiltøk, ið væl lýsa nýggja profilin, ið Artiscope leggur seg eftir.

- Eins og vit sjálvir, so kenna fólk flest í Keypmannahavn ikki so nógv til tónleikanøvnini, ið vitja á Norðuratlants Bryggjuni. Fólk hava trupult við at fyrihalda seg til púra ókend nøvn. Tí hava vit avgjørt at skipa fyri minifestivalum. Tað er lættari at fyrihalda seg til, at nú er ein singer/songwriter festivalur ella ein hip hop festivalur, enn at nøkur heilt ókend nøvn standa á plakatini, greiður Jannick frá, meðan vit ganga stutta teinin frá skrivstovuni hjá Artiscope yvir til Norðuratlantsbryggjuna.

### Fólk eru forvitin

Tað er Jannick, sum hevur høvuðsfyriskipanina av tiltøkunum á Norðuratlantsbryggjuni undir hond. Hann vísir á, at Norðuratlants Bryggjan er áhugaverd.

- Vit skulu fáa Norðuratlants Bryggjuna at lýsa upp í havnarlagnum. Sum tú sjálvur sært, so liggja húsini sera væl fyri, og vit merkja longu, hvussu stóran áhuga fólk hava í hesum húsum. Tá vit skuldu skipa fyri Svartakálk festivalinum, settu vit okkum í samband við nógvar danskar miðlar, og tað var sera týðiligt, at fólk vóru forvitin. Hesi húsini liggja so væl fyri, men tey høvdu ongan kunnleika um tey. Hesa vælvild og áhuga hava vit roynt at brúkt, sigur Jannick.

### Samstarv og netverk

Í roynd at gera tað ókenda eitt sindur betur kent, hevur Artiscope sett kend donsk nøvn á skránna og fingið tey at samstarva við nøvn úr Útnorðri. Á Svartakálk festivalinum samstarvaði føroyski Thor Simonsen við kenda danska Hip Hop nanvið DJ Nut, sum er kendur m.a. úr Hip Hop Kontoret og úr Scratchmasters. Á Ljómandi Kuldabrúgv vóru Randi Laubek og Dennis Mejdal vertir fyri einum breiðum skara av listarfólki úr Útnorðri.

### Spennandi skrá fyri framman

Ætlanir eru longu um fleiri festivalar, eitt nú ein elektroniskan festival, ein rokkfestival og luttøku sum virkið jassspælistað á Copenhagen Jazzfestival. Eisini er eitt barnatiltak á skránni.

- Hetta skal vera eini hús fyri øll, tað er týdningarmikið, at Norðuratlantsbryggjan ikki verður eitt museum, men eitt livandi stað har mentan verður blanda og sýnd fram, sigur Nicolaj.